Vikublaðið Sosialurin

Nr. 50 - 12. mars 2010

# Kári Árting heldur grækarismessurøðu í Havn



Grækarismessuhaldið í Havn verður sunnudagin 14. mars kl. 15.00. Skótalið Sigmunds Brestissonar skipar fyri Grærismessuhaldið í Havn sunnudagin 14 mars. Grækarismessudagur er 12. mars, har skótarnir saman við borgarum í býnum heilsa várinum og og flytifuglunum vælkomnumtil landið. Frá gamlari tíð er sagt, at Tjaldrið, tjóðfuglur okkara kemur á grækarismessu. Tað var Sverri patursson, sum fyrstur helt fólkafund á hesum degi í seinru helvt á 1930 árunum; loysunar orð hansara var: Latið smáfugl og heiðafugl hava fri!. Tað var Sverri Patursson sum heitti á skótarnar um at halda henda dagin í 1942, tí hann meinti at skótarnir livdi eitt við náttúruna. Nú halda vit grækarismessu við skótaskrúðgongu og fólkafundum fleiri staðni í Føroyum og heilsa Tjaldrinum, vælkomið til land okkara aftur. Allir skótar, úlvar, og títtlingar í Havn og á Argjum, fara at ganga skrúgongu og Havnar Hornorkestur spælir. Øll skulu møta í sínum skótahølum klokkan 14. Klokkan 14.45 fer skrúðgongan úr Vágsbotni. Gingið verður eftir Bøgøtu, síðani eftir Tróndargøtu, Niels Finsensgøtu oman á Vaglið. Sjálvt Grækarismessuhaldið verður á Vaglinum í Havn klokkan 15. Í ár verður tað Kári Árting sum hevur verðið Fylkisstjóri í SSB og nú stjóri í Rit & Rák, fer at halda grækarismessurøðuna í ár.

# Boykottaðu fund hjá Anniku Olsen

**Hvørki samgonga ella andstøða vildu taka av eini innbjóðing frá Anniku Olsen um at møta á fundi at viðgera framtíðar kommunubygnaðin í Føroyum. Sjálv ætlar landsstýriskvinnan sær at stríðast víðari**

KOMMUNUBYGNAÐUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Annika Olsen ásannar, at politiska viðgerðin av málinum um framtíðar kommunubygnain, hevur verið niðurbrótandi og serliga vónsvikin er hon av sínum egnu floksfeløgum. Men hon ætlar sær ikki at gevast á hondum og vónar at finna eina semju á ólavsøku*

Mikudagin skuldi veruligt hol setast á politiska arbeiðið at finna eina semju um framtíðarkommunubygnaðin á fundi.

Startskotið skuldi vera ein fundur, sum landsstýriskvinnan í innlendismálum hevði bjóðað umboðum fyri allar flokkar at koma á mikumorgunin at viðgerða spurningin.

Tá hevði Annika Olsen ætlað, at ein politiskur fylgibólkur við umboðum úr øllum flokkum skuldi fara undir arbeiðið at finna eina semju um kommunubygnaðin.

Men tað var bara ein flokkur sum møtti og tað var hennara egni flokkur, Fólkaflokkurin.

## Boykottaðu fundin

Grundin til, at uppmøtingin var so vánalig er fyri ein part, at onkur misskiljing var íkomin og onkur hevði ikki fingið boð, sigur Annika Olsen.

Men tað er í øllum førum heilt greitt, at ein orsøk er eisini tann, at politiskir flokkar bæði í andstøðu og í samgongu, beinleiðis boykotta arbeiðið.

Flokkarnir í andstøðu hava boðað frá, at eftir teirra tykki, er støðan í samgongu so ógreið, at tey fara ikki at møta í nøkrum politiskum fylgibólki at viðgera kommunubygnaðin, fyrrenn samgongan sjálv er greið yvir, hvat hon ætlar.

Og Javnaðarflokkurin í samgonguni hevur somu støðu.

Tá ið aðalorðaskiftið var í Løgtinginum um kommunubygnaðin, mælti Hans Pauli Strøm, javnaðartingmaður, beinleiðis Anniku Olsen til at blaka álitið um framtíðarkommunubygnaðin í ruskspannina.

Hann sipaði til, at Fólkaflokkurin er ósamdur innanfloks, at tað fæst hvørki høvd ella hali á nøkrum.

Og nú ger John Johannessen, politiskur formaður í Javnaðarflokkinum, greitt, at støðan í samgonguni er so ógreið, at Javnaðarflokkurin fer ikki í nakran politiskan fylgibólk, fyrrenn hann fær ein greiðan arbeiðssetning.

## Rættiliga niðurbrótand i

Eftir at bara Fólkaflokkurin møtti á fundinum, ásannar landsstýriskvinnan, at hon hevur ein trupulleika.

Hon dylir ikki fyri, at hon er rættiliga vónbrotin at móttøkuni, sum ætlanin hevur fingið í løgtinginum.

Serliga er hon vónbrotin av fleiri av sínum egnu floksfeløgum í Fólkaflokkinum, sum hvørki tóku undir við endamálinum ella við mannagongdini.

- Hetta hevur verið rættiliga niðurbrótandi, sigur hon.

- Men trupulleikin er ikki størri enn so, enn at hann kann loysast, staðfestir hon í sama viðfangi og eg havi framvegis vón um, at tað ber til at loysa málið, leggur hon afturat.

Hon leggur afturat, at vil andstøðan ikki taka av eini innbjóðing at vera við í arbeiðnum, verður tað hennara sak.

Annars metir hon, at tað eru bara nakir fáir tinglimir í samgonguni, sum eru ímóti ætlanini.

- Men tað ber ikki til, at nakrir fáir tinglimir skulu sleppa at beina fyri eini so týðandi ætlan.

## Leggja saman við lóg

Ein grundleggjandi ósemja er um kommunur skulu leggja saman við lóg ella ikki, men ta ósemjuna heldur hon, at tað ber til at loysa við samskifti ímillum flokkarnar.

Hon leggur dent á, at tí hevur hon á ongan hátt slept ætlanini.

Nú fer hon at reisa málið á einum samgongufundi fyri at finna út av, hvørja støðu, samgongan samanumtikið hevur til ætlanina.

- Málið er í grundini einfalt. Tað snýr seg um at áseta, hvussu nógvar kommunur skulu vera, hvørji málsøki tær skulu umseta og hvussu kommunurnar skulu klára at fígga umsitingina.

Men hon leggur dent á, at talan skal vera um ein samlaðan pakka.

- Tað verður ikki so, sum ávísir tinglimir halda, at kommunurnar skulu fáa ávís málsøki at umsita, so finna tær sjálvar útav at leggja saman.

- Skúli og eldraøki eru so týðandi málsøki, at tað verður ikki lat undir kommunurnar, uttan at full vissa fæst fyri, at tær eru førar fyri at umsita tað á fult nøktandi hátt og tað verða tær bara um tær leggja saman.

Tað verður heldur ikki so, sum aðrir tinglimir halda, at kommunur skulu leggja saman fyrst og so fáa tær ávís málsøki at umsita aftan á.

- Leggja kommunur saman, mugu tær hava nakað at leggja saman til. Tað er onki endamál at leggja saman bara fyri at leggja saman og tí mugu kommunurnar vita, hvat tær fáa at umsita.

Annika Olsen leggur tískil dent á, at samanlegging, fíggingin og málsøkini skulu fylgjast í einum samlaðum pakka.

So fer politiska viðgerðin at vísa, hvussu stórur pakkin verður og tað dugir hon ikki at siga nakað um enn.

Og sjálv er hon ikki banggin fyri at leggja kommunur saman við lóg, verður tað neyðugt, tí hon er sannførd um, at okkurt má henda.

- Sum støðan er nú, er tað mín sannføring, at skal nakað henda á økinum, verður tað neyðugt at gera tað við lóg, leggur hon afturat.

- Men eg skal ikki gera hetta til ein avgerandi spurning, skoytir hon upp í

Annika Olsen sigur, at hon miðjar eftir at kunna leggja uppskot fyri Løgtingið í heyst um, hvussu nóvir kommunur skulu vera, hvørji málsøki skulu vera og, hvussu tey skulu fíggjast.

# Hurlivasi í samgonguni um kommunubygnaðin

**Tað er pínliga greitt, at tað er hurlivasi í samgonguni um ætlanini at umskipa kommunala**

KOMMUNUBYGNAÐUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Samgongan er púra í villareiði um, hvørja støðu hon skal hava til framtíðar kommunubygnaðin í Føroyum.

Tað varð pínliga greitt eftir aðalorðaskiftið í tinginum herfyri.

Bæði Alfred Olsen, Anfinn Kalsberg, Jákup Mikkelsen Jógvan á Lakjuni og Gerhard Lognberg, sum allir eru í samgongu, eru hart ímóti at leggja kommunur saman við lóg.

Alfred Olsen er ímóti at leggja kommunur saman við lóg, tí tað finna kommunurnar sjálvar útav

Anfinn Kallsberg ger greitt, at hann atkvøður ikki fyri at leggja kommunur saman við lóg. Hann sigur, at fyrst skulu málsøki leggjast út til kommunurnar at umsita og so leggja tær saman sjálvbodnar.

Hans P. Strøm, tingmaður fyri Javnaðarflokkin kallar støðuna fyri ein glæntrileik og hann mælir Anniku Olsen til at koyra kommunuálitið lúkst í ruskspannina. Hann sipar serliga til at ósemjan er so stórt í Fólkaflokkinum.

Andreas Petersen úr Javnaðarflokkinum heldur, at tað ber ikki til at lata standa, tí tað er tað sama sum at seigpína kommunurnar at leggja saman.

- Tá verður ongin samanlegging, fyrrenn kommunurnar eru komnar so illa fyri at grundleggjandi tænastur ikki virka longur, so tær verða tvingaðar at leggja saman, men tað er bæði primitivt og órationelt at bíða so leingi.

Eyðgun Samuelsen, sigur, at tað er ein treyt, at skúlin skal ikki leggjast undir kommunurnar at umsita, soleiðis, sum ætlanin hevur verið, men annars skulu vit ikki bíða eftir sjálvbodnari samanlegging.

Hon krevur eisini, at skattaskipanin verður umløgd, so at kommunuskatturin ikki verður eitt fast prosent tal, men verður stigveksandi, akkurát sum landsskatturin.

Men tað vilja aðrir tinglimir úr samgonguni ikki hoyra talan um.

Hinvegin heldur Jaspur Vang úr Sambandsflokkinum, at løgtingið má skera ígjøgnum og leggja kommunur saman við lóg.

Úr andstøðuni eru Heini O. Heinesen og Miðflokkurin ímóti lógarfestari samanlegging.